# Fróðskaparfelagið heiðrar Hjálmar Hátún

**Hjálmar Hátun fekk herðaklapp á aðalfundinum hjá Fróðskaparfelag Føroya um vikuskifti fyri vælgjørt granskingararbeiði**

FRÓÐSKAPUR



Fróðskaparfelag Føroya hevði um vikuskiftið árliga aðalfundin.

Sum eitt nýtt tiltak í felagum varð fyri fyrstu ferð givið herðaklapp til ein ungan granskara fyri vælgjørt granskingararbeiði. Herðaklappið varð givið Hjálmari Hátún, granskara á Havstovuni, ið samstundis er knýttur at Nansen Sentrinum í Bergen.

Til at meta um hvør skuldi hava heiðurin frá Fróðskaparfelagnum, varð sett ein nevnd, við Anniku Sølvará, Beintu í Jákupsstovu og Boga Hansen. Metingarnevndin gjørdi greitt at Hjálmar Hátún skuldi hava Herðaklappið 2009, millum annað við hesi grundgeving:

»Hansara gransking hevur vakt stóran ans uttanlands; men er samstundis innan eitt øki, sum hevur ógvuliga stóran týdning fyri Føroyar, nevniliga grundarlagið undir teimum stóru pelagisku fiskastovnunum, sum ferðast fram við okkum.«

Við heiðursbrævinum fylgdi ein peningagáva á 25.000 krónur, sum Hjalti í Jákupsstovu tók ímóti.

Aðalfundurin takkaði fráfarandi forkvinnu Annu Maria Fosaa, stjóra á Náttúrugripsavninum, Elin Súsannu Jacobsen, lektara á Søgudeildini hjá Fróðskaparsetur Føroya, og Turið Sigurðardóttir, professara á Føroyamálsdeildini fyri gott avrik í 2009.

Nevndin hevur skipað fyri sera væleyðnaðum tiltøkum í sambandi við, at tað eru 200 ár eru síðani at Charles Darwin varð borin í heim og 150 ár síðani at slóðbrótandi verkið »The Origin of Species« kom út. Hesi tiltøkini hava verið skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelag Føroya og Føroya Náttúrugripasavn, og nógv fólk hava lurtað eftir fyrilestrunum, sum hava verið hildnir í tí sambandinum.

Nevndin, sum skal virka í komandi ári eru sostatt: Helgi Michelsen, kassameistari, og William Simonsen, umframt tríggir nýggir limir, sum vórðu valdir inn í nevndina, Firouz Gaini, næstformaður, Kristin Magnussen, skrivari og til nýggja forkvinnu varð vald Maria Dam, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og onkur sólglotti og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinnapartin møguliga upp í skrið. Regn av og á og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og landsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -7 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 15 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrystið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani kemur spakuliga hendavegin. Brúgvaløgini við Føroyar hvørva eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/11 kl. 06[00] – 1/12 06[00]. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° -
Mesti hiti máldur í desember: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/11 kl. 06[00] – 1/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

2. desember Fullmáni
4. desember Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. des | 06:56 | 19:25 | 05:56 | 18:25 | 06:11 | 18:40 | 08:56 | 21:25 | 09:56 | 22:25 | 05:11 | 17:40 | 04:11 | 16:40 | 07:11 | 19:40 | 08:11 | 20:40 | 06:41 | 19:10 | 07:56 | 20:25 |
| 4. des | 07:54 | 20:23 | 06:54 | 19:23 | 07:09 | 19:38 | 09:54 | 22:23 | 10:54 | 23:23 | 06:09 | 18:38 | 05:09 | 17:38 | 08:09 | 20:38 | 09:09 | 21:38 | 07:39 | 20:08 | 08:54 | 21:23 |
| 5. des | 08:53 | 21:20 | 07:53 | 20:20 | 08:08 | 20:35 | 10:53 | 23:20 | 11:53 | - | 07:08 | 19:35 | 06:08 | 18:35 | 09:08 | 21:35 | 10:08 | 22:35 | 08:38 | 21:05 | 09:53 | 22:20 |
| 6. des | 09:47 | 22:12 | 08:47 | 21:12 | 09:02 | 21:27 | 11:47 | - | 00:20 | 12:47 | 08:02 | 20:27 | 07:02 | 19:27 | 10:02 | 22:27 | 11:02 | 23:27 | 09:32 | 21:57 | 10:47 | 23:12 |
| 7. des | 10:38 | 23:01 | 09:38 | 22:01 | 09:53 | 22:16 | 00:12 | 12:38 | 01:12 | 13:38 | 08:53 | 21:16 | 07:53 | 20:16 | 10:53 | 23:16 | 11:53 | - | 10:23 | 22:46 | 11:38 | - |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo